# Listaframsýning til frama fyri buss

**Hetta vikuskiftið verður ein listaframsýning í Smiðjuni í Lítluvík, sum foreldur og avvarðandi at búfólkunum á Eiragarði 16 og Kiwanis skipa fyri**

FRAMSÝNING
*Solby A. Eliasen*

Tað verða fleiri av okkara kendastu listarfólkum við á framsýningini. Millum onnur kunnu nevnast Arngarð Joensen, Bárður Jákupsson, Tróndur Patursson og Øssur Mohr.



*Listaframsýning verður í Smiðjuni um vikuskiftið til frama fyri handicapbuss til Eirargarð 16*

*Mynd: Jens K. Vang*

Listaframsýningin er til frama fyri ein handicapbuss til Eiragarð 16, og allur peningurin fer óskerdur til endamálið.

Tað at tað eru so mong ymisk listarfólk við á framsýningini ger, at hon er sera fjølbroytt og spennandi.

Framsýningin verður opin í dag, leygardagin, og sunnudagin frá klokkan 14 til 20.

## *Tøkk*

*Eg vil takka øllum tykkum, sum gjørdu mær 75 ára dagin tann 15/3 so hugnaligan. Takk fyri gávur, blómur, fjarrit og ein serlig tøkk til sangkórið.*

*Tykkum verður ynskt eini gleðilig páskir.*

***Jacob Norðberg,***
***Hvalba***

†

Kunngjørt verður fyri ætt og vinum, at kæra mamma, omma, vermamma, dóttir og systir okkara

**Magnina Eidesgaard Kirk**
Skive

andaðist á Viborg sjúkrahúsi 1. apríl, 56 ára gomul.

Jarðarferðin verður leygardagin 5. apríl kl. 12.00 frá Estvæd kirke.

*Vegna tey avvarðandi*
**Lars og Kathrine, mamma og systkin**












